# Heksaetur

Eitt polyetur (fleirflatingur) er eitt skap í rúminum, sum er avmarkað av polygonum (fleirkantum). Polyetur hava horn (H), flatar (F) og kantar (K). Eru allir flatar gjørdir úr somu javnsíðaðu polygon, siga vit, at polyetrið er regulert, t.e., allir flatar eru eins, - teir hava allir líka nógvar kantar, sum allir eru líka langir, og úr hvørjum horni ganga líka nógvir kantar.

Longu í fornøld vistu fólk um reguleru polyetrini. Í seinni tíðum hevur sveisiski støddfrøðingurin Leonhard Euler (1707-1783) kannað polyetur. Við setningi hansara um konveks polyetur:

$$H + F - K = 2$$

ber til at prógva, at bara 5 reguler polyetur eru til! Tey eru tetraetrið, heksaetrið, oktaetrið, dodekaetrið og ikosaetrið. Regulera heksaetrið hevur 8 horn, 6 flatar og 12 kantar.



**Regulert heksaetur**



**Prenta á pappír í hóskandi tjúgd.**
**Klipp heksaetrið úr arkinum.**
**Tak eina linjál og strika eftir strikunum við knívi.**
**Boygg síðan um kantarnar og líma saman.**